## Fundur í Hoydølum

Í gjár vóru umboð fyri Stjórnarskipanarnevndina í Hoydølum og kunnaðu næmingarnar um arbeiðið at smíða eina nýggja føroyska stjórnarskipan. Jóan Pauli Joensen, sum er formaður í nevndini, greiddi frá stjórnarskipanum í søguligum ljósi og týdninginum av at fáa eina slíkan. Rúni Rasmussen, skrivari, greiddi frá ymsum spurningum, sum nevndin hevur tikið støðu til. Áhoyrararnir fingu høvi at spyrja, og fleiri góðir spurningar vóru.

## Fríhandil kring landið

Í sambandi við at 150 ár eru liðin, síðani einahandilin varð tikin av, fara løgmaður og Landsskjalasavnið á kunningarferð við fyrilestrum og gomlum skjølum. Í kvøld eru tey í miðhøllini í Nýggjaskúla í Vestmanna, hóskvøldið í Leikalund í Klaksvík og mánakvøldið í næstu viku í handlinum hjá T.F. Thomsen á Tvøroyri. Øll tiltøkini byrja klokkan 19. Løgmaður leggur fyri, og síðani siga søgukøn frá. Tiltøkini enda við tónleiki.

# Bjørn Kalsø fingið ein stóran trupulleika

**Landsstýrismaðurin má greiða frá, hví hann hevur ligið á eini kunngerð í fleiri ár, sum kundi forða fyri at útlendingar leggja føroysk fiskiskip og føroysk fiskiloyvi inn undir seg. Í morgin fer Tórbjørn Jacobsen at reisa málið í Løgtinginum**

KEYP OG SØLA AV FISKILOYVUM
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*– Tað er ein spurningur um ikki Bjørn Kalsø hongur í eini tunnari slintru, heldur Tórbjørn Jacobsen, løgtingsmaður. Hann krevur at fáa eina f orkláring frá landsstýrismanninum í fiskivinnumálum*

– Hetta er eitt heilt ótrúliga álvarsligt mál og Bjørn Kalsø má geva okkum eina forklárning.

Tórbjørn Jacobsen, Løgtingsmaður, er reiðiliga skakkur av avdukingini í Sosialinum í gjár.

Landsstýrismálanevndin hjá Løgtinginum hevur kannað teir risastóru handlarnar seinastu tíðina, har illgruni hevur verið um, at útlendingar eiga meiri í skipunum, enn 33%, sum teir í mesta lagi kunnu eiga eftir lógini.

Í eini fyribils niðurstøðu, sigur landsstýrismálanevndin beinleiðis, at landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum hevur skúgvað sínar skyldur til viks.

Nevndin sipar til, at Landsstýrismaðurin hevur alla tíðina havt heimild til at gera eina kunngerð, har treytir verða settar, sum tryggja, at lógin verður hildin.

Men hesa kunngerðina hevur landsstýrismaðurin ongantíð gjørt.

Samstundis vísir Landsstýrismálanevndin á, at øll eru vitandi um, at íløgupeningur í føroysk fiskiskip í alt størri mun verður fingin til vega við útlendskum lánspeningi.

Harumframt hava eigarar og leiðsla í felagnum, sum eiga ávís skip, bundið seg til ikki at taka týðandi avgerðir uttan at útlendski lánsveitara góðkennur tað.

### Serliga tyngjandi fyri Bjørn Kalsø

– Men nú vísir tað seg, at landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum hevur ligið oman á hesi kunngerðini, sigur Tórbjørn Jacobsen.

Serliga tyngjandi heldur hann at hetta er fyri Bjørn Kalsø, sum nú er landsstýrismaður í fiskivinnumálum, tí tað er hesi seinastu árini, at teir risastóru handlarnir eru gjørdir.

Og tað vil hann nú hava frágreiðing upp á.

Tí fer hann at reisa málið í Løgtinginum í morgin, har hann fer at spyrja Bjørn Kalsø, hví hann ikki hevur brúkt sína heimild til at gera kunngerðirnar, har treytirnar verða ásettar.

– Tað, at landsstýrismaðurin onki hevur gjørt við hetta málið, er heilt ómetaliga álvarsligt og tað er ein spurningur um hann ikki hongur í eini klænari slintru.

Tórbjørn Jacobsen sigur, at eitt land, sum missur sítt tilfeingið av landinum, tekur grundarlagið undan sær sjálvum og tá ið landsstýrismenn ikki byrgja upp fyri hesum, sjálvt um teir hava heimild til tað, er ógvuliga álvarsamt.

– Tí hevur Bjørn Kalsø ein stóran trupulleika, leggur hann afturat.

Hann sigur, at hann hevur fleiri ferðir spurt eftir hesum.

Tórbjørn Jacobsen ásannar, at hetta sama var galdandi í undanfarnu samgongu, sum hann sjálvur var í.

– Men tað er ikki fyrrenn nú, at hetta kemur fram í ljósmála og tað er ikki fyrrenn hesi seinastu árini, at teir stóru handlarnir eru gjørdir.

– Eg má viðganga, at eg visti ikki av, at landsstýrismaðurin hevði tær heimildir, sum skuldu til, men tá í hesi málini komu fram i ljósið, átti landsstýrismaðurin beinanvegin at brúkt tær heimildir, hann hevði at forða fyri hesum.

Ein frágreiðing hevur verið, at Fiskimálaráðið hevur ikki arbeiðsorku til at kanna hvønn einstakan skipahandil.

– Hetta er ikki ein frágreiðing, sum kann góðtakast. Skulu vit lata alt tilfeingið fara á útlendskar hendur, tí at vit ikki hava ráð at seta ein ella tveir fulltrúar at kanna málini. Hetta er so heldur ikki ein frágreiðing, sum landsstýrismaðurin ikki hevur ført fram, fyrrenn nú. Tí er hetta ikki annað enn undanførsla, sigur Tórbjørn Jacobsen.

# Ólóglig uppsøgn kann verða dýr fyri landskassan

**Løgtingsins umboðsmaður staðfestir, at Jóan Petur Davidsen varð sagdur upp sum leiðandi yvirlækni ólógliga og tí meta løgfrøðingar, at hann eigur fulla løn fyri hetta árið, hann ikki hevur røkt starvið**

UPPSØGN OG ALMENN UMSITING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað kann fáa umfatandi avleiðingar fyri landskassan, at Jóan Petur Davidsen í fjørð sagdur úr starvi sum leiðandi yvirlækni á skurðdeildini á Landssjúkrahúsinum.

Løgtingsins Umboðsmaður hevur viðgjørt málið og hann er komin til ta niðurstøðu, at uppsøgnin varð ólóglig, tí tey grundleggjandi rættindini hjá Jóan Petur Davidsen vóru ikki fylgd.

Umboðsmaðurin sigur nevniliga, at hann kundi ikki sigast upp, fyrrenn tænastuligt forhoyr, ella tænastumannasak hevur verið frammanundan.

Men tað hevur tað ikki verið í hesum føri og tí mælir umboðsmaðurin Almanna- og Heilsumálaráðnum til at lata alt málið ganga umaftur eftir reglunum í tænastumannalógini.

Og tað merkir, at tænastuligt forhoyr, ella tænastumannasak skal reisast ímóti honum.

Hinvegin kann Jóan Petur Davidsen sjálvur biðja um tænastuligt forhoyr.

Vit hava tosað við nakrar løgfrøðingar um, hvørjar avleiðingar hetta kann fáa.

Og eitt, sum løgfrøðingarnir siga, er hetta má merkja, at Jóan Petur Davidsen lógformliga ikki er settur frá sum leiðandi yvirlækni.

Men tað merkir eisini, at hann hann eigur løn, sum leiðandi yvirlækni alt hetta árið, síðani hann varð frákoyrdur og til hann verður lógliga uppsagdur eftir reglunum í tænastumannalógini.

Men at fara undir eitt tænastuligt forhoyr, ella eina tænastumannasak, kann lættliga taka ár at avgreiða.

Men niðurstøðan hjá Løgtingsins Umboðsmanni merkir so eisini, at so leingi Jóan Petur Davidsen ikki lógliga er uppsagdur, má hann metast at hava starvið.

– Formliga er hann framvegis leiðandi yvirlækni og hevur krav upp á løn samsvarandi hesum, til hann verður lógliga loystur úr starvinum.

Hetta er ikki fyrstu ferð, at fólk í almennum starvi verða søgd upp, uttan at farið er fram eftir reglunum og Løgtings Umboðsmaður hevur gjøgnum árini viðgjørt fleiri mál av hesum slagi. Og fleiri ferðir er tað eisini endað við, at almennir stovnar hava fingið átalur og eru rættleiddir.

Ein løgfrøðingur, sum vit hava tosað við, sigur, at í veruleikanum vísir tað seg, tað er ógvuliga torført at siga fólki í almennum starvi, upp.

– Ein munur á almenna arbeiðsmarknaðinum og privata arbeiðsmarknaðinum, er, at verða fólk í almennum starvi søgd upp, skulu sakligar grundgevingar verða fyri tí. Somu skyldu hava privatir arbeiðsgevarar ikki.

Men løgfrøðingar halda eisini, at almennir stjórar eru viðhvørt ov bangnir fyri at boða frá veruligu orsøkini til eina uppsøgn av berum bangilsi fyri at uppsagnargrundin ikki er haldgóð.

– Ístaðin verður alt møguligt vavt saman fyri at bryggja haldgóðar orsøkir saman fyri eini uppsøgn. Og viðhvørt er hugflogið dekan og gott og tí enda málini mangan í eini umsitingarligari fløkju. Og sum fleiri dømi eru um í seinastuni eru fleiri slík mál enda hjá Løgtingsins umboðsmaður og hann kemur mangan til ta niðurstøðu, at rættindi hjá uppsøgdum starvsfólki eru skúgvað til viks.

– Og tað ger seg so eisini galdandi í hesum føri við Jóan Petur Davidsen, siga Løgfrøðingar.

### Ongar viðmerkingar

Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í almanna- og heilsumálum, hevur ongar viðmerkingar til málið.

Hann hevur ikki havt umstøður at seta seg inn í úrskurðin hjá umboðsmanninum.

Hann sigur, at í næstum fer umsitingin at gjøgnuganga niðurstøðuna hjá Løgtingsins Umboðsmanni. Umsitingin skal so gera eitt tilmæli, sum síðani verður lagt fyri landsstýrismannin og viðgjørt saman við honum.

Tað hevur ikki eydnast at fáa eina viðmerking frá sjúkrahúsleiðsluni.